eisini nógv pláss spart. Átta træplattar fylla líka líka nógv sum eitt tons av frystum slógvi.

## Frystilast ikki neyðug

Ein annar fyrimunur er tann, at nú ber til at flyta frysta slógvið í vanligari kølilast á skipið. Frystilast er ikki longur neyðug. Orsøkin er tann, at tá eingir træplattar eru, ber til at stúgva slógvið meira saman, soleiðis at tað heldur betur uppá kuldan.

Við teimum mongu træplattunum í lastini er nógv luftstreyming og træ bindur eisini hitan. Tí er neyðugt at hava slógvi í fyrstilast tvørtur um hav, tá tað stendur á træplattum.

Jónleivur Olsen vísir á, at teir á Bacalao hava sent fryst slógv uttan træplattar til Finlands. Slógvið var heldur ikki í frystilast. Tað vísti seg at bera væl til.

## Fýra ár á Bacalao


Jónleivur Olsen ehvur arbeitt á frystideildini á Bacalao í fýra ár. Hann hevur hesi árini m.a. flutt túsundtals træplattar við slógvi. Tað er í hesum arbeiði sínum, at hann hevur fingið hugskotið til uppfinningina.

Hann sigur: — Hetta er ein sera einføld uppfinning, men eg havi varhugan av, at fólk, tá tey hoyra um hana, ikki rættiliga duga at skilja hana. Kanska júst tí hon er so einføld.

— Eg haldi sjálvur, at hetta er nakað, sum vit kunnu hava stórt gagn av. Bæði útreiðslur til træplattar og til flutnings kunnu sparast. Og tá vit útflyta fleiri túsund tons av slógvi á slíkum plattum um árið, so kann tað lættliga gerast til stór tøl.



**Jónleivur Olsen: — Óneyðugt verður við hesum træplattunum, um álvara verður gjørt av at brúka nýggju uppfinningina.**
**Hesir plattarnir eru júst umvældir**




**Uppskotið til uppfinningina, sum er sent patentskrivstovuni í Danmark**



**Kristian Joensen arbeiðir í slógvrúminum á Bacalao, sum er eitt tað størsta av sínum slag í landinum. Her tekur hann slógvpláturnar úr frystaranum og stúgvar tær upp**